# Tann endaliga loysnin bíðar

**Nólsoy:** Gjøgnum tíðirnar hava skiftandi skip røkt hesa leiðina. Tey seinnu mongu árini hevur Ritan kortini verið álitið hjá nólsoyingum.

Nú er líkt til, at enn ein broyting er á skránni í hesum sambandi. Gongst sum ætlað, fer Ternan at røkja hesa farleiðina, helst longu í vár sum skilst.

Vígdis Bjarnadóttir er ikki fult greið um, hvat hon skal halda um hesa loysnina. Fyri hana er bert ein einstøk loysn – ein varandi loysn:

- Eg hevði heldur viljað at ein kom fram við eini varandi loysn. Ein loysn sum var skræddaraseymað til okkara tørv, og sum verður gjørd eftir okkara ynskjum, sigur hon álvarsom á málinum.

Ein heilt annar spurningur er eisini, hvar tað "nýggja" skipið skal liggja: Skal tað vera inni á kajuni ella úti á Klivum, har flakavirkið var í síni tíð?!

Bygdarfólkið hevur hoyrt graml um, at Ternan skal leggja at úti við Klivar. Hetta halda tey ikki serliga nógv um, tí her er talan um eina kaj sum í veruleikanum er brotin.

Er høg flóð so kunnu aldurnar bróta niðan har sum fólkið skal ganga til bátin, og tá kann ein rokna bæði við einum og øðrum liggjandi á bryggjuni, m.a. hvalspýggjum og tara.

- So tað verður neyvan stuttligt hjá okkum ferðandi at fara vassandi gjøgnum slíkt tíðliga á morgni í myrkri og ringum veðri, sigur Vígdis.



*Vígdir Bjarnadóttir kundi hugsað sær betri umstøður hjá teimum sum ferðast við barnavognum og koyristólum. – Henda loysnin verður ikki fullførd fyrrenn vit fáa eitt skip sum er skræddaraseymað til okkara tørv, sigur hon*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

og í land av skipinum.

Í hesum føri skilst á fólki, at Ritan dumpar í so máta!

Áður var bert ein landgongd sett upp, og máttu tey ferðandi fara eftir hesi. Var nógv flóð stóð landgongdin meiri at kalla steyrrætt, og tá er lætt at hugsa sær, hvussu trupult tað var hjá fólki við barnavogni, koyristólum og øðrum at koma umborð.

- Tað vísti seg eisini, at trupulleikin var soleiðis, at eldri fólk nærum ikki hættaðu sær at fara til Havnar av hesi orsøk, sigur Vígdis álvarsom á málinum.

Nú eru tíbetur gjørdar ábøtur á landgangin í Nólsoy, har ein rampa, sum varð sett upp í fjør, ger tað meiri høgligt hjá fólki at sleppa umborð og í land aftur.

## Á dekkinum

Ritan er útgjørd við eini salong, sum kann taka upp til 125 ferðafólk. Hon er somuleiðis útstýrd við einum rúmi á dekkinum, og sum hevur verið nýtt til ymisk endamál, m.a. sum sjúkrarúm.

Í dag er hetta rúmið eitt hent tilhaldsstað hjá fólki við koyristóli – og sum í morgun, hjá fólki, ið skulu ørindi til Havnar við barnavogni.

- Fyrr vóru fólk noydd at standa úti á dekkinum í øllum veðri, men í dag eru hesar umstøðurnar vorðnar betri.

- Hinvegin eru hurðarnar til ampa fyri tey ferðandi, eins og tey mugu biðja onnur fólk flyta seg, so at tey sleppa inn og út úr rúminum. So tú skilir, at umstøðurnar eru ikki sørt óhøgligar, slær Vígdis fast.

Í hesum sambandi er eisini vert at nevna, at allur farmurin til og úr oynni verður lossaður umborð. Her er ikki annað at gera, enn at brúka og svinga kranan yvir økið, har ferðafólkið stendur.

- Spurningurin er, hvussu forsvarligt hetta er!

> *Hóast mangir nólsoyingar hava sagt og framvegis siga, at "Ritan er gauv", so er hon kortini ikki betri enn so, enn at tey ynskja sær eitt annað og meiri tíðarhóskandi skip til farleiðina.*

---

dagarnar eru tað tey, sum sakna túrin á middegi. Er onkur sum umhugsar at arbeiða hálva tíð í Havn, mugu tey annaðhvørt fara fyrri frá arbeiði enn ætlað, - ella tey mugu bíða til túrin kl. 16:20.

Vígdis heldur lítið um ætlanina at fække túrarnar hjá Rituni. Ja, hon skýrir tað beinleiðis sum "hol í høvdið":

- Tað er eingin skilagóð loysn at lækka túratalið hjá okkum. Eg meini so við, - hvat kostar henda rutan?

- Tað kann neyvan vera tann stóra útreiðslan, um man setur tað upp ímóti týdninginum sum farleiðin hevur fyri okkum sum búgva herúti. Serliga um politikkararnir meina nakað við at fólk framvegis skulu búgva á útoyggjunum, slær Vígdis Bjarnadóttir rimmarfast.




SOZOPREPRESS

## P/F Fiskaaling søkir granskara

Søkt verður eftir granskara at arbeiða við framleiðslu av plantu- og djóraæti. Í samband við yngulframleiðslu av marinum fiskasløgum framleiðir Fiskaaling djóraæti í stórum sjógvhyljum á royndarstøðini í Nesvík. Í løtuni verður arbeitt við fáa betur innlit í framleiðsluna. Í hesum sambandi verður søkt eftir granskara at taka lut í hesum arbeiði.

**Førleikar**
- tú hevur viðkomandi útbúgving, universitetsútbúgving í lívfrøði ella líknandi
- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert nýhugsin og ágrýtin
- tú dugur at samskifta á enskum

Í verkætlanini verður arbeitt tætt saman við granskarum á Fiskaaling og á Havstovuni. Høvuðsaktiviteturin verður at standa fyri ætiframleiðslu í Nesvík, taka sýni og kanna hesi. Í samband við sýnini inngongur m.a. at eyðmerkja plantu- og djóraæti. Neyðug upplæring verður veitt til hetta arbeiði. Góður møguleiki er fyri framhaldandi granskingarstarvi. Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Øystein Patursson á tlf 214787 ella Ingolf Joensen á tlf 214747.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**P/F Fiskaaling**
Við Áir
FO-430 Hvalvík

ella

fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 11. januar 2010. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er umleið 20, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo